Burger King til SMS

Stóra "fast-food" ketan, Burger King, fer skjótt at lata sína fyrstu deild upp í Føroyum. Henda deildin kemur at liggja í SMS har Perlan er nú, og er ætlanin, at henda skal lata upp síðst í september mánaða

MATUR
Ingrid Bjarnastein

Talan er um eitt 700 m2 øki, har Burger King, Sunset Boulevard og ein onnur "matstova" skulu húsast. Í hesum sambandi fer Perlan, sum er núverandi matstovan í SMS, at detta burtur.

Burger King er ein tann størsta "fast-food" ketan í heiminum, og eru umleið 26.000 deildir av ketuni spjaddar kring knøttin.

– Hetta hevur verið ein lang mannagongd, at fáa Burger King hendavegin. Tað hevur tikið umleið eitt hálvt ár at fáa alt uppá pláss, sigur Niels Mortensen, stjóri í SMS.

– Men teir hava so mett, at grundarlag er fyri hesum her. Tað kemur at virka uppá Friendship-basis, sum tað eitur. Hetta vil siga, at tað verður SMS, sum kemur at eiga og reka tað, meðan vit so gjalda eina upphædd til teir.

Alt á sama stað

Sunset Boulevard er ein keta, sum er í Danmark. Her er talan um sandwich, sum tú verður gjørd meðan tú bíðar. Tú kanst fáa bæði grillaðar og ógrillaðar sandwich. Sunset Boulevard leggur seg eftir tí sunnu linjuni og hevur so lítið feitt sum møguligt. Sunset Boulevard kemur eisini at koyra á sama hátt, sum Burger King.

– Hugskotið við tí heila er, at samlað allan matin á einum staðið, og allar matstovurnar koma at vera lið um lið. Sitiplássini verða tey somu. Grundin til, at hetta verður gjørt er fyri at kunna at bjóða so nógv sum gjørligt fram, og somuleiðis nøkta nógvar ymsar tørvir. Tann triðja matstovan er ein pizza/steak, so um ein familja kemur at eta í SMS, so kunnu vit sum so bjóða teimum tað teimum lystir, sigur Niels Mortensen.

Allar tær nýggju matstovurnar lata upp samstundis, og er ætlanin at hetta skal vera síðst í september mánaða.

Burger King fer saman við Sunset Boulevard og aðrari matstovu at lata upp í SMS, har perlan heldur til í løtuni

Starvsvenjing hjá Grímu og í Lindini

Vit hava tosað við tveir næmingar í 9. flokki í Tórshavnar Kommunuskúla. Annar er í starvsvenjing hjá Grímu og hin í Lindini.

STARVSVENJING
Jóna Thomsen og Birita Simonsen

15 ára gamla Barbara H. Olsen er í starvsvenjing hjá Grímu

Mynd: Jens Kristian Vang

Ragnar Djurhuus er í starvsvenjing í Lindini, og tað dámar honum sera væl

Mynd: Jens Kristian Vang

Barbara H. Olsen úr Havn er í starvsvenjing hjá Grímu. Tað dámar henni sera væl. Hon hevur m.a. seymað leikbúnar, verið í sjónvarpinum og hugt eftir sjónleikarunum, meðan teir hava sett røddir til ein teknifilm. Í vikuskiftinum skal hon til Nólsoyar til eina sjónleikarastevnu.

Barbara valdi at fara í starvsvenjing hjá Grímu, tí hon er sera áhugað í sjónleiki. Hon heldur, at tað kundi verði stuttligt at arbeitt við hesum seinni í lívinum.

Við einum stórum smíli sigur Barbara okkum, at tað er gott, at skúlin skipar fyri starvsvenjing. Hon sigur, at tú lærir nógv ymiskt, og tað er gott, at henni ikki nýtist at fara í skúla í heilar tvær vikur.

Ragnar Djurhuus úr Havn er í starvsvenjing í Lindini. Honum dámar sera væl at vera her.

Hann hevur roynt nógv ymiskt t.d. hevur Ragnar viðgjørt gamlar sangir, hevur sjálvur gjørt eina lýsing, og seinni skal hann gera eina sending.

Ragnar sigur okkum, at hann heldur, at tað hevur verið nógv stuttligari enn væntað. Hann sigur eisini, at hann heilt avgjørt vil arbeiða við tílíkum seinni í lívinum.

Hann heldur, at tað er nógv meira spennandi og stuttligari at vera í starvsvenjing enn at vera í skúla.

121 fólk broytt viðurskifti í dagpeningaskipanini

Fyri flestu teirra, sum seinasta summar fingu boð um, at tey ikki longur eru fevnd av dagpeningaskipanini, er tað galdandi, at A-inntøkan er farin upp um tey vegleiðandi 25 prosentini, sum er ásett

FYRISPURNINGUR
Turið Kjølbro

Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, hevur svarað skrivligu fyrispurningunum frá Annitu á Fríðriksmørk, tingkvinnu

Eftir, at dagpeningalógin varð broytt seinasta summar, vórðu nøkur fólk, sum hava verið í Sjálvbodnu Dagpeningaskipanini í styttri og longri tíðarskeið, burturvíst úr skipanini. Í blaðnum høvdu vit viðtal við fólk, listafólk og sjálvstøðug, sum kærdu sína neyð. Hesi hava eftir burturvísingina ikki annan møguleika, verða tey sjúk, enn at dúva uppá forsorgarhjálp. Og tað vildi eingin teirra. Dagpeningalógin varð broytt við tí endamáli, at hon skuldi gerast ein betri skipan fyri øll. Tí kom tað óvart á landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum, Sámal Petur í Grund, at nøkur fólk vórðu tveitt úr skipanini.

- Tað hevur ongantíð verið ætlanin, at fólk skuldu detta úr skipanini. Heldur tvørturímóti. Endamálið var at gera eina betri skipan fyri øll. Eg eri sinnaður at broyta lógina beinanvegin, soleiðis, at hesi fólk koma í skipanina aftur, segði Sámal Petur í Grund í viðtali við Sosialin fyri tveimum vikum síðani.

Í hesum sambandi setti tingkvinnan Annita á Fríðriksmørk landsstýrismanninum nakrar skrivligar fyrispurningar, sum verða svaraðir í tinginum í dag. Hon spyr eitt nú, hvussu nógv fólk hava fingið boð um, at tey eru koyrd úr dagpeningarskipanini, síðani løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku við meiri kom í gildi, og hvør orsøkin er til, at hesi eru koyrd úr skipanini. Til hetta svarar landsstýrismaðurin, at 121 persónar eru ikki longur hesi koyrd úr dagpeningaskipanini, tí tey lúka ikki treytirnar longur. 12 persónar eru koyrdir úr, tí hesir onga inntøku hava.

Rætt til dagpengar

Tann kanska mest áhugaverdi spurningurin er, hvussu hesum fólkum, sum seinasta árið eru koyrd úr skipanini, eru tryggjað inntøka, um tey av eini og hvørjari orsøk gerast sjúk. Til hetta sigur landsstýrismaðurin, at 52 persónar eru beinleiðis fevndir av grein 2 og 3 í dagpeningalógini, tí teir eru løntakarar og hava ongan rætt til løn undir sjúku. Hetta merkir, at hesir hava rætt til dagpengar sambært dagpeningalógini. 33 persónar eru starvsmenn og hava tí rætt til løn undir sjúku frá arbeiðsgevaranum. Hesir persónar hava ikki rætt til útgjald úr dagpeningaskipanini, tí sambært grein 2, stk. 3 verður dagpeningur ikki veittur í tann fevndir av ásetingunum í kap. 7 í lógini, men at fleiri teirra tó eru fevndir av grein 2 sum vanligir lønmóttakarar. 109 persónar eru dotnir úr skipanini, tí hesi hava A-inntøku og lúka tí ikki treytirnar til ta sjálvbodnu tryggingina.

Sambært viðmerkingum til grein 15 um dagpening stendur, at "fyri at kunna tekna sjálvbodna trygging krevst, at tryggingartakarin burturav ella í mestan mun er sjálvstøðugur vinnurekandi. Hetta skal skiljast soleiðis, at hesin skal virka sum sjálvstøðugur í so stóran mun, at eitt møguligt vanligt løntakaraarbeiði við síðuna av, bert er at meta sum viðfáningur. Vegleiðandi kann sigast, at umleið 75 prosent av inntøkuni seinasta inntøkuárið skal stava frá sjálvstøðuga virkseminum fyri at tryggingartakarin kann tekna trygging."

Fyri teir 109 persónarnar er A-inntøkan farin upp um tey vegleiðandi 25 prosentini, sum ásett eru í viðmerkingunum, og eru frá arbeiðsgevara ella øðrum hevur rætt til løn undir sjúku við meiri ella aðrar veitingar, sum eru endurgjald fyri mista inntøku vegna sjúku við meiri. 11 persónar, sum frammanundan høvdu hálva trygging, hava ikki ynskt at tekna fulla trygging. Viðvíkjandi teimum eftirverandi 25 persónunum má hvørt einstakt mál kannast, fyri at gera av, um arbeiðsgevarin skal gjalda løn undir sjúku, ella um tey eru fevnd av dagpeningalógini, herundir møguliga grein 3, stk. 2, nr. 2.

Tingkvinnan sóknast eisini eftir teimum reglum og kunngerðum, sum í lógini standa skula koma í gildi. Hetta arbeiðið er ikki gjørt enn. Landsstýrismaðurin er í ferð við at broyta dagpeningalógina, og í hesum sambandi er ætlanin at gera tær reglur og kunngerðir, sum dagpeningalógin ásetur. Hann roknar við, at hetta arbeiðið verður liðug miðskeiðis í ár.

Hanus til Helsinki og Tallin

Ritverk Hanusar og føroysk viðurskifti standa á skránni, nú Hanus Kamban fer til Finnlands og Estlands á vitjan

MENTAN
Turið Kjølbro

Finska-føroyska vinarfelagið Tjaldur hevur boðið Hanusi Kamban, rithøvundi, til Finnlands at greiða frá bókini um skaldið Janus Djurhuus. Tiltakið verður í Helsinki í dag. Hanus Kamban hevur sum kunnugt skrivað eitt stórt verk um stóra føroyska skaldið í trimum bindum, sum komu út fyri nøkrum árum síðani. Í fjør kom verkið út í danskari útgávu í tveimum bindum. Vinarfelagið Tjaldur hevur eisini heitt á Hanus um at lesa upp úr fagurbókmentaliga ritverki sínum.

Á vitjanini í Finnlandi fer Hanus Kamban eisini at greiða frá politiskum og mentunarligum viðurskiftum í Føroyum. Leygardagin vitjar Hanus Kamban eitt ungdómsfelag í Helsinki, har hann somuleiðis fer at greiða frá ritverki sínum og annars føroyskum viðurskiftum.

- Havi varhugan av, at finnar hava stóra áhuga fyri føroyskum viðurskiftum, ikki minst politiskum viðurskiftum. Teir síggja nøkur felags eyðkenni millum finnar og føroyingar. Finnland eins og Føroyar er ein útjaðari í norðurlendska økinum, sigur Hanus Kamban.

Ferðin hjá Hanusi heldur fram til Estlands eftir innbjóðing frá Nordisk Informationsbureau í Thallin. Skráin í Estlandi verður øðrvísi. Brot úr bókini Pílagrímar eftir Hanus Kamban, sum kom út undan jólum, verða listin upp á estiskum av estiskum sjónleikarum. Tónleikur verður spældur innímillum. Hanus lesur eisini upp á føroyskum.

- Tað er hugaligt, at áhugi er fyri tí, ein tekst við, hóast eg ikki rokni við, at kunnleikin hjá estum til føroyskar bókmentir ella Føroyar sum heild er so stórur. Kunnleikin er ivaleyst størri í Finnlandi.

- Tað er spennandi at fara til Estlands fyri fyrstu ferð. Tað er forvitnisligt at koma hagar, serliga havandi í huga gongdina frá 1991, tá ið Estland fekk loysing. Eisini við tí í huga, at Estland stendur á gáttini at sleppa inn í ES. Thallin er ein spennandi býur við nógvum søguligum minnismerkjum. Nøkur felags eyðkenni eru við Føroyar. Estland hevur søguliga altíð verið dominerað av øðrum londum. Tí kundi eg hugsað mær, at áhugi er fyri føroyskum viðurskiftum í Estlandi.

- Estland er bókmentaliga eitt ógvuliga kosmopolitiskt land. Í fyrru helvt av farnu øld vóru nógvir estiskir høvundar, sum dugdu fleiri mál. Havi hitt fyri nøkrum árum síðani ein tann kendasta estiska høvundan í okkara tíð, Jaan Kross, sum í 5-6 ár sat í sovjetiskari arbeiðslegu, sigur Hanus Kamban.